# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Hóast vantandi royndir, løgið navn, rasuskilnað og sterkt mótvalevni gjørdist Obama 44. amerikanski forsetin*
*(Time)*

# Kreppupakki við 4,5 billiónum krónum

**Umfatandi nýgerð á samferðsluøkinum og aðrar almennar íløgur skulu halda amerikonsku hjólunum malandi**

Um ein mánað tekur Barrack Obama við sum amerikanskur forseti, og vælvitandi keldur siga nú, at hann tá fer at koma við einum risastórum kreppupakka, sum skal fáa ferð aftur á amerikanska búskapin.

Í morgun kom fram, at kanska vera 850 milliardir dollarar ella 4,5 billiónir krónur í pakkanum hjá Obama. Tað hevur ljóðað, at hansara búskaparráðgevar høvdu upprunaliga mælt til at koyra 600 milliardir dollarar í pakkan, men at teir seinni hava skotið upp at fara heilt upp í 850 milliardir dollarar. Vælvitandi keldur siga, at ráðgevarnir hava longu givið Kongressini ábendingar um, hvussu nógv verður í pakkanum.

Búskaparfrøðingar siga, at skattalættin, sum Bushstjórnin kom við í vár, er einki aftur ímóti pakkanum hjá Obama, sum kann samanberast við tiltøkini, sum táverandi stjórnin setti í verk í kreppuárunum í 1930-unum.



*Barrack Obama er í ferð við at fyrireika ein stóran kreppupakka til amerikanararnar*
*Mynd: AP*

### Samferðslukervið

Ætlanin hjá Obama er at brúka ein stóran part av kreppupakkanum til at útbyggja og nútímansgera tað amerikanska samferðslukervið. Ætlanin umfatar millum annað nýggjar vegir og nýggjar jarnbreytir.

Harumframt ætlar hann at brúka nógvar pengar til at umbyggja almennar bygningar, so teir skulu brúka minni orku enn nú. Nógvir skúlar skulu umbyggjast og nútímansgerast, og eisini her verður miðað eftir at skerja orkunýtsluna.

Politiskir viðmerkjarar í Washington siga, at saman við kreppupakkanum kemur eitt uppskot um skattalætta, tí Obama veit, at tað kann vera trupult at fáa Kongressina at samtykkja ein kreppupakka uttan at egna við onkrum so sum einum skattalætta. Her verður helst talan um at lækka skattin á lág- og meðalinntøkum, uttan at tey múgvandi skulu gjalda meiri skatt.

Umframt kreppupakkan og skattalætta fer Obama væntandi at biðja Kongressina um eykajáttan til verkætlanir, sum skulu hjálpa teimum, sum koma í neyð orsakað av arbeiðsloysi.

### Ársins navn

Tíðarritið Time velur á hvørjum ári ársins navn, og í morgun bleiv kunngjørt, at valið í ár er fallið á Barrack Obama.

Time vísir á, at fyri tveimum árum síðani hevði helmingurin av amerikanska fólkinum ongantíð hoyrt navn hansara, men at í dag taka flestu amerikanarar tað sum eina sjálvfylgju, at ein mynd av honum er á forsíðuni í bløðunum.

# Mumbai-yvirgangsmenninir komu ikki úr Pakistan

**Pakistanski forsetin heldur uppá, at menninir, sum framdu yvirgangin í indiska býnum Mumbai, ikki komu úr Pakistan**

Asif Ata Zardari, forseti vísir aftur indisku tíðindunum um, at yvirgangsmenninir komu úr Pakistan. Hann sigur, at tað finnast eingi prógv, sum knýta yvirgangsmenninar at Pakistan.

Í samrøðu við bretska kringvarpið BBC sigur Zardari, at myndugleikarnir eru ikki lidnir at kanna Mumbai-málið, og tí vil hann ikki geva nakað boð uppá, hvør ella hvørjir teir seku er.

Indiska stjórnin heldur fast um, at tað vóru kreftir í Pakistan, sum løgdu atsóknina at Mumbai til rættis, og bretsku myndugleikarnir hava eisini sagt, at yvirgangsmenninir vóru úr pakistanska bólkinum Lashkar-e-Taiba.

Pakistanski forsetin sigur við BBC, at Pakistan er til reiðar at hjálpa indisku myndugleikunum við Mumbai-málinum, og Pakistan er eisini sinnað at lata indisku myndugleikunum fregnartænastuupplýsingar í sambandi við málið, sigur hann.



*Pakistanski forsetin Asif Ali Zardari*
*Mynd: AP*

## STUTT SAGT

### Russar royna tolið hjá Obama

Ein embætismaður í amerikanska uttanríkisráðnum sigur, at russisku myndugleikarnir ætla sær at royna tolið hjá Barrack Obama, tá hann tekur við forsetaembætinum. Sambært embætismanninum ætla rossar at herða mótstøðuna ímóti amerikonsku rakettverjuskipanini fyri at vita, hvat Obama fer at svara. Russar eru serliga illir um, at partar av rakettverjuskipanini skulu setast upp í Póllandi og Kekkia, og teir hava hótt við at seta rakettir upp í Kaliningrad sum svar.

Embætismaðurin í uttanríkisráðnum í Washington sigur, at russar taka eingi stig ímóti rakettverjuætlanini, fyrr enn Obama hevur tikið við sum forseti. Tað avgerandi er, hvussu Obama fer at svara, tá russar hvessa orðalagið, sigur hann.



*Russland er blivið meiri ágangandi á sjónum og í luftini í seinastuni*
*Mynd: AP*

### Mótmælismenn deyðadømdir

Í Kina hevur ein dómstólur felt dóm í málinum ímóti tveimum monnum, sum rendu ein ruskbil inn í eitt fylgi av løgreglumonnum, sum vandu í býnum Kashgar fyri fýra mánaðum síðani. Atsóknin kostaði 17 løgreglumonnum lívið, og 15 fingu skaða. Dómstólurin var eisini eirindaleysur og dømdi báðar menninar til deyða, skrivar AP.

Kashgar er í landspartinum Xinjiang, og har hava leingi verið vápnaðir samanbrestir millum víðgongdar muslimar og kinesisku myndugleikarnar.

Uighur-minnilutin, sum býr í landspartinum, vil vera við, at kinesisku myndugleikarnir kúga tey, og at tey tí seta seg upp ímóti teimum. Myndugleikarnir siga haraftur-ímóti, at tað eru yvirgangsmenn, sum herurin og løgreglan stríðast við.